## DAGSINS MEINING

# Teir blíva við

Tað ger ikki mun, um Føroya fremstu serfrøðingar tala at. Tjóðveldismenn eru byrjaðir at sáa iva um ognarrættin til oljuna, og síggja fram til eitt – fyri at brúka orð varaløgmans – eljustríð um hesa olju. At so mætir menn, sum Árni Olafsson og Halgir Winther Poulsen tala at, fær ikki Tjóðveldismenn at kveklast við, og harvið avdúka teir so dyggiliga alt bluffnummarið aftanfyri Hvítubók og teirra serfrøðinganýtslu annars. Soleingi teir fingu serfrøðingafrágreiðingar, ið undirbygdu studentarætlanina um fullveldi, so var í lagi. Tá nú øll serfrøðin hevur at Tjóðveldinum viðvíkjandi ábyrgdarleysu undirbrotligheitini um oljuna, so er knappliga ikki talan um jura, men um politikk. Sami flokkur, ið hevur trúttað niður í fólk, at fullveldisætlanin var objektivt røtt og bygdi á fólkarætt, meðan aðrir fóru í politiskar skotgrøvir, tosar nú um politikk og ikki jura.

Høvuðsargumentið hjá Tjóðveldisflokkinum um hví danir knappliga skulu krevja ágóðan av oljuni og ikki av eitt nú fiskiríkidømi, er, at peningarligu virðini skulu verða so nógv størri. Við øðrum orðum meinar Tjóðveldisflokkurin, at danir av sínum eintingum kunnu taka alt her í Føroyum, men tíma ikki, tí peningavirðini ikki eru stór nokk. Fyri tað fyrsta eru nógv fleiri milliardir komnar burtuúr fiskivinnuni, enn oljuvinnan í besta føri kann geva av sær tey næstu nógvu árini, og fyri tað næsta er ein klokkuklár avtala frá 1992, ið sigur, at føroyingar hava yvirtikið ráevnini í undirgrundini. Um so er, at onkur danskur politikari í tí lætta endanum hevur lisið orð varaløgmans, og ætlar at brúka tey móti okkum føroyingum, so kunnu vit róliga standa sum ein maður og vísa á 1992 avtaluna

Tað má sigast at vera sera álvarsamt, tá landsstýrismaðurin í lógarmálum av øllum í einari vallýsing sáar iva um grundarlagið undir fleiri lógum, ið hendan samgongan hevur lagt fram og samtykt.

At undirbrotligheit tjóðveldismanna hevur negativar avleiðingar fyri umdømi føroyinga sum seriøsir avtalupartnarar er longu farið at síggjast. Danska avísin Berlingske Tidende hevði eina grein herfyri um vallýsingina hjá Høgna Hoydal, og nevndi í hesi grein eisini nøkur av teimum tingunum, ein av føroysku búskparfrøðingunum hevur skrivað um oljuárin á búskapin. Henda grein varð refererað í einum føroyskum blað. Av einari ella aðrari óvissari grund var einki nevnt um, at greinin handlaði um óhepnu vallýsingina hjá Høgna Hoydal – endurgevingin endurgav bert orð Kára Petersens og segði einki um Høgna Hoydal, ið hevði skapt pínliga uppmerksomheit um seg í Berlingske Tidende. Tað er so ymiskt, sum eygu síggja ella vilja síggja.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hava ikki sett seg inn í málið

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*



Hóast tað var ætlanin at níggjundi kommunulæknin í Havn skuldi flyta inn í níggju viðtaluhølini í Gundadali, so varð henda avgerð broytt aftan á at læknin varð settur.

Í Degi og Viku seinasta fríggjadag sigur forkvinnan í Sosialu nevnd í Havn, at tað ikki var ætlanin, at níggjundi kommunulæknin í Havn skuldi flyta inn í nýggju viðtaluhølini í Gundadali. Men kortini stendur greitt í lýsingini eftir níggjunda kommunulæknanum, at nýggj viðtaluhøli verða bygd til starvið, sum verða klár at taka í nýtslu 1. oktober, sama dag, sum læknin skal setast.

Beate L. Samuelsen viðgekk í Degi og Viku, at tað stendur í lýsingini, at nýggj viðtaluhøli verða bygd. Men samstundis segði hon, at fyri tað, at tað stóð í lýsingini, at nýggj høli verða bygd, so merkir hetta ikki, at nýggi læknin skal flyta inn í hølini.

Heilt erligt Beate! Um tú veruliga hevði sett teg inn í málið, hevði tú vitað, at býráðið longu í 2000 heitti á Almanna- og Heilsumálastýrið um at seta níggjunda kommunulæknan, samstundis sum tað boðaði frá, at nýggj høli verða bygd til hansara.

Innstillingin til býráðið 5. Oktober 2000, sum var einmælt samtykt, er so ljóðandi:

**»Uppskot til innstilling:** Mælt verður býráðnum til at heita á Almanna- og Heilsumálastýrið um at normera og lýsa 9. kommunulæknastarvið leyst, soleiðis at læknin kann byrja, samstundis sum viðtaluhølini eru liðug.«

Heldur tú ikki, Beate, at tað er eitt sindur løgið at boða frá í lýsingini, at nýggj høli verða bygd, um læknin ikki sleppur at flyta inn í tey? Um talan bert er um eina upplýsing, ið einki hevur við starvið at gera, kundi tað so ikki eins væl staðið í lýsingini, at býráðið arbeiðir við at byggja út havnarlagið?

Hví sigur tú ikki sum er, at tit í meirilutanum als ikki hava setta tykkum inn í málið, og at tit komu við broytingini á sosialnevndarfundi tann 18. september 2001, hóast málið um læknahølir als ikki var á skránni?

# Ein fúl jólagáva

**Jógvan Poulsen**

So kom bókin »Horvin føroyingur«, sum eg var eitt sindur spentur uppá. Nú eri eg, undirritaði, blivin ein eldri maður, 75 ár, so eg veit nærum alt um Severin og heimið hjá honum, við tað, at vit eru nærum av sama plássi.

Er Grækaris ein so góður rithøvundur sum onkur vil vera við, so skuldi hann eisini duga sær at sortera og vraka, men har er hann eiðasørur, tí, fyrsta tú blaðar í bókini sært tú tær fyrstu lygnirnar, sum okkum ikki eru so ókendar. Tit kunnu lesa sjálvi, og tað sær man allan vegin út gjøgnum bókina. Fyri tað fyrsta, so er hann úti eftir at sverta alla Oyrabygd – tað var tøkkin tey fingu.

Men drankari og horbukkur sum Severin sigur, tað var Jákup ikki kendur fyri at vera. Men, so koma vit til blaðsíðu 136–137, tá kom sjokkið, – ja, so ógvusligt, at eg græt.

Grækaris, nú hevur tú lítið at týða. Tú, at fara at spilla mammu okkara so út sum tað ringasta eitt konufólk kann koma út fyri. Tað er ein so álvarslig ærumeiðing, ja, av grovasta slag, og at vit skulu vera uppvaksin av matinum, sum Jákup tók frá sínum egnu børnum, tað er ein so grov útspilling sum man ikki bara kann lata fara, tí hetta eru tíni orð, tað er tú, sum hevur skrivað bók um okkum út til alt Føroya fólk og meira enn tað. Tú mátti skammast, Grækaris, og so eru vit skyldmenn eisini – tví vorði tær. Jú, væl var pápi sjúkur og lá á sanatorinum í 2 ár, frá 39–41, men Gud havi lov, vit liðu onga neyð, vit vóru 3 brøður tá, tann elsti var 4 ár eldri enn eg, hann var burtur og tjenti pengar, og vit gjørdu alt, ið hoyrdi húsinum til, so vit skylda ongum nakað.

Ja, Grækaris, hatta var ein tung byrða, tú legði á mín rygg, sum eg noyðist at bera tað eg havi eftir. Tú skuldi skammast, men óvist at hetta er liðugt so.

# Viðmerking til Jógvan Poulsen

**Grækaris Djurhuus Magnussen**

Tú sigur í viðmerking í bløðunum, at eg sum boðberi fyri Severin leggi mammu tína undir alt ilt. Men hetta hevur tú misskilt, Jógvan. Tað verður ongastaðni nevnt í bókini, hvaðan viðkomandi kvinna búði. Haraftrat vísir Severin á hesi viðurskiftini í sambandi við tíðina, tá hann var stórur smádrongur, t.e. umleið 1928 til 1930 – ella 10 til 12 ár áðrenn pápi tín lá á sanatoriinum. Fyri at ongin misskiljing skal vera kann eg upplýsa, at konan, Severin umrøður, hvørki búði á Oyri, Oyrarbakka ella Norðskála.

Oyrarbygd havi eg onga orsøk og enn minni hug at sverta, soleiðis sum tú vilt vera við. Eg veit heldur ikki rættiliga, hvat tú meinar við, tá tú tosar um at sverta Oyrarbygd. Er tað happingina, tú sipar til, kann eg viðmerkja stutt, at sonevnd "óektað børn" vórðu happað uttan mun til hvar í Føroyum tey búðu tá á døgum. Tað mundi ikki vera nakað serfyribrigdi fyri Oyri. Men Jákup búði á Oyri og ikki í øllum Føroyum.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.